## Fylgiskjal 1 A (veitarar):

1.1 Leiguprísir og annað.
NET leigar pláss til hýsing í bygningum og mastrum hjá NET. NET hevur bygningar og mastrar kring oyggjarnar. Setið tykkum í samband við Heilsøludeildina fyri at frætta meira um staðsetingar og kostnað.

Leigari rindar leigu fyri í minsta lagi 1 fermetur (har hæddin av útgerðini í mesta lagið er 2,2m). Leigar leigari 1 til 2 fermetrar, rindar leigari fyri 2 fermetrar o.s.fr.

Leigari rindar fyri í minsta lagi 0,5 fermetrar í mastur. Leigar leigari 0,5-1 fermetur, rindar leigari fyri 1 fermetur o.s.fr.

**Skápspláss til leigu - galdandi fyri støð har vegfast er.**

Møguligt verður at leiga pláss í støðd 0,6X0,6X0,4 metrum.
Er talan um 0,4 metrar í hædd, er hetta galdandi sum eitt leigumál, meðan er talan um 0,4-0,8 metrar í hædd, er hetta galdandi sum tvey leigumál o.s.fr.

Um nýtt skáp skal bíleggjast til endamálið, kann væntast ein veitingartíð upp á 6-8 vikur.

**Kostnaður**

| Stovningarkostnaður | Árligur kostnaður |
|---|---|
| 7.500 kr | 3.500 kr hvørt leigumál |

Allir aðrir prísir eru sambært samhýsingaravtaluni.

1.2 Elprísir og annað
Gjaldast skal fyri egna elnýtslu umframt felags nýtslu, sum t.d. hita, ljós og køling. Harumframt er møguleiki fyri á ávísum støðum at binda seg í 48V battarí, short-break og/ella no-break.

Gjøldini fyri hesar tænastur verða roknað sum prosentpartur av egnari elnýtslu.

**Talva 1**

| | Prosent-lutur av egnari elnýtslu |
|---|---|
| Gjald fyri felags elnýtslu | 80 |
| Íbinding í 48 v battarí | 100 |
| Íbinding í short-break | 25 |
| Íbinding í no-break | 30 |

Ikki er møguligt at binda seg í ávikavist 48V battarí, no-break og short-break á øllum støðum, tað verður viðgjørt fyri hvønn fyrispurning.

1.3 Stovningargjald.

| Kostnaður av sáttmála | Kostnaður | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| Viðgerð av fyrispurningi um samhýsing | kr. 500 um tíman | |
| Stovning av sáttmála | kr. 5.000 | Stovningargjald fyri at gera ein samhýsingarsáttmála er kr. 5.000. Stovningargjald verður bert kravt fyri høvuðssáttmálan millum leigara og NET (t.v.s. bert einaferð). |

1.4 Gjald fyri fylgi.

Umbøn um fylgi til bygning skula sendast til radiodeildina á NET á telefon nummar 303030/243641, somuleiðis um boðast skal frá ólagi/-breki.

Fylgi við 3 daga fráboðan.

| | Arbeiðstíð Mánadag til fríggjadag frá kl. 8-16 | Uttanfyri arbeiðstíð Mánadag til fríggjadag frá kl.16-08, leygardagar, sunnudagar umframt heiligdagar |
|---|---|---|
| Kostnaður pr. tíma. | kr. 350 | kr. 800 |

Fylgi uttan 3 daga fráboðan.

| | Arbeiðstíð Mánadag til fríggjadag frá kl. 8-16 | Uttanfyri arbeiðstíð Mánadag til fríggjadag frá kl. 16-08, leygardagar, sunnudagar umframt heiligdagar |
|---|---|---|
| Kostnaður pr. tíma. | kr. 500 | kr. 1.000 |

Í ávísum førum kann NET lata leigara atgongd til bygningarnar uttan fylgi.

Um leigarin ynskir at broyta ella vaksa um egna útgerð í bygningunum/mastrunum, skal NET varskógvast skrivliga minst 14 dagar undan við at seta seg í samband við Heilsøludeildina á NET á tel 303030/243608.

1.5 leveringartíðir

NET gevur svar um møguleiki er fyri samhýsing innan 3 mðr. Undir vanligum umstøðum geva atgongd til bygning/mastur 1 mánaða seinni.

**Allir prísir í sáttmálanum eru uttan MVG.**